Jákup hevur vunnið fyrsta umfarið

Avrikið leygardagin var meiri enn góðkent, sjálvt um tað ikki eydnaðist Partick Thistle at vinna á heimavølli

SKOTLAND
Jóannes Hansen

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hevur ein føroyskur fótbóltsspælari roynt seg í bestu skotsku deildini. Jákup Mikkelsen vardi málið, tá ið Partick Thistle leygardagin hevði vitjan av Livingston, og sambært skotskum fjølmiðlum spældi tað bara væl av hjá Jákupi Mikkelsen.

Úrslitið var 1-1. Í Partick siga teir, at teir sjáldan fáa fulla úrtøku burturúr fyrsta umfarinum, men teir iðra seg um, at tað ikki gekk betri hesa ferð, enn tað gjørdi:

– Eftir at vit vóru komnir á odda eftir ein hálvan tíma, høvdu vit fleiri møguleikar at økja um leiðsluna. Men vit tóku ikki av, og soleiðis sum tað tørnaði út seinna partin av seinna umfarinum, kunnu vit einki siga til, at Livingston fekk eitt stig. Í veruleikanum vóru teir síðstu løtuna nærri sigrinum, enn vit vóru, tí fimm minuttir undan dystarenda stútaðu teir dygst omanfyri málið, staðfesti Partick venjarin, Gerry Collins. Hann er nýggjur venjari, eftir at hann frammanundan hevur verið hjálparvenjari.

Saman við Jákupi Mikkelsen vóru seks aðrir fyri fyrstu ferð á liðnum hjá Partick Thistle. Málverjin fær góða umrøðu. Eina staðni fær annar av álopsmonnunum, Grady, eitt átta tal, og saman við Jákupi fáa tríggir av liðfeløgunum eitt sjey tal.

Jákup verður ongan møguleika sagdur at hava havt, tá ið Livingston eitt lítið korter undan dystarenda javnaði til 1-1. Miðvallarin, McBride, fekk í skotsku miðlunum skyldina, tí hann ikki skuldi hava verið nóg avgjørdur, tá ið hann royndi at sparka burtur. Gerry Collins varð sagdur at vera rættuliga argur, tá ið miðvallarin klossaði í tí, og hann varð skjótt tikin av vøllinum, men eftir dystin royndi hann at bera í bøtuflaka fyri spælaran, sum hann annars rósti fyri at hava spælt væl.

Livingston málskjútti var argentinski Fernando Pasquinelli, sum smekkaði flatt og dygst inn fyri handaru stólparótini.

Partick Thistle seti hol á, tá ið ein hálvur tími var farin. Ken Milne, sum ongantíð áður hevur skorað fyri Partick, smekkaði bóltin upp í nettakið.

Fleiri bjargingar

Jákup Mikkelsen varð beinanvegin settur undir trýst. Longu í triðja minutti royndu mótstøðumenninir seg við langskoti, sum hannt ók sær væl av. Bestu bjargingina verður hann sagdur at hava havt, tá ið mótstøðumenninir royndu at lyfta upp um hann. Jákup metti rætt, toygdi seg og fekk fatur á bóltinum.

Næsta uppgávan hjá Partick Thistle verður á útivølli leygardagin. Tá skulu teir spæla á útivølli ímóti Kilmarnock. Hetta liðið hevði ógvusliga byrjan upp á nýggja kappingarárið. Teir vitjaðu á Ibrox í Glasgow, har Rangers legði lunnar undir Europa Cup avbjóðingina ímóti FCK í annaðkvøld. Rangers vann 4-0.

Tað er neyvan nakað at ivast í, at Jákup Mikkelsen aftur leygardagin verður í Partick Thistle málinum, og nummarið á troyggjuni kundi bent á, at venjarin hevur ætlanir um at brúka føroyska málverjan. Jákup hevur fingið troyggjuna við eitt talinum, meðan kappingarneytin hjá honum, Kenny Arthur, hevur fingið tólv talið. Men tað skal neyvan leggjast so nógv í hetta. Í Molde hevði Jákup eitt talið, meðan Eddie Gustafsson, hevði nummar tólv. Tað er ikki fyrrenn Jákup er farin úr Molde, at Eddie, sum skal spæla ímóti KÍ hóskvøldið, hevur fingið eitt talið á ryggin.

Brøndby bragdliga byrjan

Heldur ikki í triðju royndini í hesum kappingarárinum eydnaðist tað Toda Jónsson at fáa mál

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Fyrrapartin í dag fóru Todi Jónsson og liðfelagarnir í FCK til Skotlands. Í annaðkvøld skulu teir spæla ein tann týdningarmiklasta dystin í stuttu søguni hjá samanlagda felagnum í danska høvuðsstaðnum. Hvussu tað fer at roynast, fer at bera til at fylgja við í TV Danmark 1 sjón varpsrásini.

Hesin dysturin er tann, sum tað í løtuni verður tosað mest um í Danmark. At áhugin er stórur fyri, hvussu tað fer at hilnast hjá FCK í stríðnum at sleppa í bólkaumfarið í europeisku meistarakappingini sæst eitt nú aftur í søluni av atgongumerkjum til heimadystin ímóti Rangers, sum verður um tvær vikur. Fríggjadagin fóru teir undir søluna av atgongumerkjum, og 32 tímar aftaná vóru 25 túsund atgongumerki seld. Roknað verður við, at tað longu í hesi vikuni verður útselt. Serliga um tað fer at laga seg væl í annaðkvøld.

Í vikuskiftinum var triðja umfarið í superliguni á skránni. Tá var talan ikki um serliga sannførandi undanroynd hjá FCK, sum spældi í Esbjerg. Kortini var úrslitið hjá FCK væl betri, enn seinast, tá ið teir vóru í Esbjerg. Úrslitið var 1-1. Esbjerg kom framum, men FCK javnaði, tá ið tað restaðu trettan minuttir. Peter Møller legði fram til Zuma, sum skoraði eitt flott mál. Zuma var ikki á vøllinum undan steðginum. Beinanvegin eftir steðgin avloysti hann Toda Jónsson, sum hevði sæð gult í 27. minutti.

Hans Backe, FCK venjarin, gav onkrum teirra, sum ikki hava verið fastir á liðnum, møguleikan, nú FCK hugsar nógv um Europa Cup. Eitt nú var Peter Møller á vøllinum allar 90 minuttirnar, meðan Todi Jónsson og Zuma spældu hvør sín hálvleik. Tað er lítil ivi um, at teir báðir fara at manna FCK álopið á Ibrox Park í Glasgow í annaðkvøld. Tað verður ikki roknað við, at Jörgen Pettersson verður førur fyri at spæla í morgin, og tað kemur ikki upp á tal, at nýggi brasiliumaðurin skal spæla í morgin.

Todi hevur skorað í báðum Europa Cup dystunum ímóti maltesiska meistaraliðnum, og hann skoraði fleiri ferðir í venjingardystunum undan kappingarbyrjan. Men higartil hevur tað ikki eydnast hjá Toda at fáa mál í landskappingardystunum.

Brøndby í hopla

Tað var stórt vónbrot hjá Brøndby, tá ið teir í næstsíðsta umfarinum undan summarsteðginum mistu meistaraskapin til FCK. Harvið misti Brøndby møguleikan at sleppa í europeisku meistarakappingina í summar. Kappingini, sum verður á skránni næsta summar, tykjast teir hava sett miðvísa kós ímóti. Eftir trý umfør eru teir einsamallir á odda. Teir hava ikki spælt upp til tað, sum tað verður roknað við, at teir skulu megna. Tí verður í Danmark spurt, hvussu tað fer at verða, tá ið Brøndby fer at finna rætta leikliga stevið.

Jón Rói Jacobsen venur saman við besta liðnum, men hann var ikki millum teir fimtan, sum Michael Laudrup hevði við til heimadystin ímóti AGF. Fyri triðju ferð í trimum dystum vann Brøndby 2-0. Men tað stóð nógv á. Hóast tað ikki hevur sæð so ógvuliga gott út í AGF, so góvu árhusianararnir dygga mótstøðu, og teir høvdu møguleikar at gera mál.

Eftir dystin segði AGF venjarin, Poul Hansen, at teir nú fara at keypa í hvussu so er tveir spælarar afturat. Í hvussu so er annar teirra verður verjuspælari.

OB aftur á jørðina

Næstsíðsta leygardag var lagið ógvuliga gott í OB, eftir at teir høvdu vunnið 4-2 á útivølli ímóti FCK. Sunnudagin komu teir av álvara niður aftur á jørðina. Teir vitjaðu í Farum, har heimaliðið, FC Nordsjælland, vann 2-0. Orðaríkið venjarin, Christian Andersen, segði aftaná, at hetta var besta avrikið hjá hansara liði nakrantíð. Annar av málskjúttunum í Farum var Carsten Fredgaard, sum hevur verið liðfelagi hjá Toda Jónsson í FCK, men sum hevur fingið lítla tíð á vøllinum. At hann kennir stórt álit frá nýggja venjaranum hevur havt við sær, at hann spælir so mikið væl, at hann var kosin dagsins maður.

Í Ikast hevði FC Midtjylland vijtan av AB, sum hevur mist nógvar spælarar í summar. Heimaliðið vann sannførandi 3-0 sigur, men venjarin hjá teimum rósti gestunum fyri gott fótbóltsspæl.

Í Álborg var tað stórt vónbrot, at AaB ikki megnaði at fáa stig burturúr ímóti uppflytarunum úr Frem, sum vunnu 1-0. Dagsins maður hjá teimum var nýggi málverjin, Jørgen Nielsen, sum vísti eina rød av góðum bjargingum.

Hitt uppflytaraliðið, Herfølge, hevði vitjan av Viborg. Herfølge vann 2–1. Chris Hermansen, sum Herfølge áskoðararnir hava sagt vera ov væl í holdum, skoraði bæði Herfølge málini.

Talan var um framúrskarandi bóltførleika, tá Sibusiso Zuma í seinna hálvleiki fekk tryggjað FCK eitt stig í Esbjerg

Julian í miðdeplinum

Føroyski miðvallarin á Akranesi legði upp til bæði málini í 2-1 heimasigrinum ímóti Fram úr Reykjavík

ÍSLAND
Jóannes Hansen

Einasta føroyska umboðið í íslendskum fótbólti er Julian Johnsson. Hann er sjálvsagdur millum teirra, sum í næstu viku á heimakvøldi skulu stríðast ímóti Íslandi. Og sunnudagin vísti Julian íslendingum, at hann er væl fyri, nú tað stundar til broðra uppgerðina í Norðuratlantshavi.

Julian Johnsson var á vøllinum allar 90 minuttirnar sunnudagin, tá ið skagamenn høvdu vitjan av Fram úr Reykjavík, og føroyski spælarin gjørdi nógv um seg.

Í steðginum var tað málleyst, men sjey minuttir eftir steðgin legði Hjört Hjartanson ÍA á odda. Julian vann bóltin á miðvøllinum, spældi álopsmannin, sum smekkaði til, tá ið hann var komin í brotsteigin.

Teir á heimaliðnum mundu fegnast ov nógv og ov leingi um leiðslumálið. Minuttin eftir, at teir høvdu lagt seg framum, javnaði Fram eftir horna og út frá.

Sigursmálið fekk ÍA eitt korter undan leikloki. Julian, sum dygst undan steðginum hevði fingið gula kortið fyri ov harðliga takling, breyt ígjøgnum í høgru, og Stéfan Þórðarson stýrdi við høvdinum innlegginum í málið.

Hóast sigurin er Akranes framvegis á áttanda og triði aftasta plássinum. Men tað er stutt fram á triðja plássið. ÍA hevur seytjan stig ella sama stigatal sum KA á sjeynda plássinum. ÍBV, sum er á triðja plássinum, hevur nítjan stig. Sunnudagin vann ÍBV á heimavølli í Vestmannaoyggjunum 1-0 ímóti Grindavík, FH tapti á heimavøllinum á Hafnafirði 2-1 ímóti Fylkir, og KR vann 2-1 á heimavølli ímóti KA. Fylkir og KR eru oddalið.

Næsta vikuskifti heldur føroyska landskappingin frí, tí landsliðsspælararnir skulu fyrireika seg til landsdystin ímóti Íslandi, sum verður mikudagin í næstu viku. Í Íslandi verður spælt av lívsins kreftum næsta vikuskifti. Sunnudagin skulu Julian Johnsson og liðfelagarnir á Akranesi spæla á Akureyri ímóti KA.

Á føroyska landsliðnum fáa flestu spælararnir dystarvenjing í heimligu landskappingini. Soleiðis er tað ikki í Íslandi. Har koma flestu landsliðsspælararnir úr útlendskum feløgum.

Norðmenn í tungum sjógvi

Feløgini, sum í vikuni skulu spæla ímóti NSÍ og KÍ, eru illa fyri, og danski verjuspælarin hjá Lyn kennir seg illa viðfarnan av norsku dómarunum

EUROPA CUP/NOREG
Jóannes Hansen

Í hesi vikuni skulu NSÍ og KÍ í europeiska eldin. Bæði liðini vunnu í vikuskiftinum, men tað var ikki frítt, at tað kendist eitt sindur av altjóða skjálvta við Løkin í Runavík, sjálvt um tað í leikskránni í sambandi við uppgerðina ímóti GÍ staðliga varð undirstrikað, at tað bara skuldi hugsast um eina uppgávu í senn, og at norska Lyn vitjanin ikki skuldi eiga pláss í huganum, fyrrenn dysturin ímóti GÍ var liðugur.

Í kvøld fer KÍ til Noregs at vitja Molde, og seint í kvøld kemur Lyn í Vágar við sama flogfarinum, sum klaksvíkingarnir fara til Noregs við.

Bæði NSÍ og KÍ ætlaðust at venja á Svangaskarði í gjárkvøldið. Har skal NSÍ spæla hóskvøldið, og KÍ skal spæla har hósdagin 28. august.

Vanliga plaga útlendsku feløgini, sum vitja í sambandi við altjóða dystir, at búgva í høvuðsstaðnum, sjálvt um dystirnir hava verið spældir á Svangaskarði. Tað skal Lyn ikki. Teir fara at búgva í Runavík.

Illur verjuspælari

Tá ið Herfølge við Jákupi Mikkelsen millum stólparnar vann DM í 2000, var Steven Lüstu álit í miðverjuni. Síðani flutti hann til AB og seinni til Lyn í Noregi. Sunnudagin var Lyn, sum er triði niðast á støðutalvuni í Tippuliguni, á vitjan hjá Rosenborg í Tróndheimi.

Rosenborg var sjálvandi favorittur, teir vunnu 2-0, og harvið styrktu teir uppaftur meiri um oddasessin, tí Sogndal, sum framvegis er næstfremst, megnaði ikki meiri enn 1-1 á útivølli ímóti næstaftasta Tromsø, ið síðstu løtuna stríddist fyri at vinna.

Men Rosenborg noyddist at stríðast fyri sigrinum ímóti mótstøðuliðnum hjá NSÍ. Teir fingu málini síðstu tíggju minuttirnar, og tað var akkurát soleiðis, at teir megnaðu at byrgja fyri Lyn málum.

Hesa síðstu løtuna varð Steven Lüstu rikin av vøllinum, tí hann hevði fingið tvey gul kort, og tað var hann sera royttur av. Hann vildi ikki fara av vøllinum beinanvegin, og tá ið hann var komin í umklæðingarrúmið sparkaði hann so dygt til ein bonk, at hann brotnaði. Danski miðverjin í Lyn varð útvístur fyri triðju ferð í hálvt annað ár, og hann fjaldi sunnukvøldið í Tróndheimi ikki yvir, at hann kennir tað sum um, at dómararnir eru úti eftir honum.

Lyn venjarin, íslendski Þordur Þórðarson, var ikki misnøgdur við avrikið hjá sínum monnum. Hann segði seg rokna við, at teir fara at vinna seg longri upp á støðutalvuna, um teir framvegis fara at sýna tann hugburðin, sum teir sunnudagin vístu á Lerkendalen í Tróndheimi.

Molde spældi ikki fyrrenn í gjárkvøldið, tá ið teir skuldu hava vitjan av Bodø/Glimt. Norsku feløgini liggja ikki á løtu síðuni. Longu leygardagin fara Lyn og Molde at hittast. Tað vil við øðrum orðum siga, at Molde fer at spæla mánakvøldið, hóskvøldið og aftur leygardagin.

Aalesund aftast

Nógv bendir á, at Aalesund, sum flutti upp síðsta heyst, fer at flyta niður aftur. Teir eru aftastir, og sunnudagin taptu teir 3-0 í Bergen ímóti Brann.

Um tað eydnaðist Bodø/Glimt at vinna í Molde í gjárkvøldið, so vera teir undir liðini á Sogndal í kappingini um annað plássið. Sogndal er ellivu stig aftanfyri Rosenborg, so tað er eingin ivi um, at Rosenborg seinni í heyst fer at vinna 12. meistaraskapin á rað.

Viking úr Stavanger er eisini við í kappingini um Europa Cup plássini. Sunnudagin fingu teir eitt stig við úr høvuðsstaðnum. Dysturin ímóti Vålerenga endaði 2-2.

Stabæk vann 1-0 á Lillestrøm. Hetta var fyrsti sigurin hjá Stabæk í sjey dystum. Bryne vann 3-2 á Odd Grenland. Sigursmálið fingu teir í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat.

Danska superligan

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Brøndby (S)	3	3 - 0 - 0	6	0	6	9
2	FCM	3	2 - 1 - 0	5	1	4	7
3	OB (S)	3	2 - 0 - 1	6	4	2	6
4	FC Nordsj.	3	1 - 2 - 0	5	3	2	5
5	Esbjerg	3	1 - 2 - 0	4	2	2	5
6	FCK (M)	3	1 - 1 - 1	5	5	0	4
7	AaB	3	1 - 0 - 2	2	3	-1	3
8	Herfølge	3	1 - 0 - 2	2	4	-2	3
9	Frem	3	1 - 0 - 2	1	4	-3	3
10	Viborg	3	0 - 2 - 1	3	4	-1	2
11	AGF	3	0 - 1 - 2	2	6	-4	1
12	AB	3	0 - 1 - 2	1	6	-5	1

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

Danska 1. deild

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Silkeborg	2	2 - 0 - 0	8	1	7	6
2	AC Horsens	2	2 - 0 - 0	5	1	4	6
3	Fremad Amager	2	2 - 0 - 0	6	3	3	6
4	Ølstykke	2	2 - 0 - 0	5	2	3	6
5	Køge	2	1 - 0 - 1	6	3	3	3
6	Fredericia	2	1 - 0 - 1	4	2	2	3
7	Skjold	2	1 - 0 - 1	4	3	1	3
8	Nykøbing	2	1 - 0 - 1	4	3	1	3
9	HFK Sønderj.	2	1 - 0 - 1	6	6	0	3
10	B 93	2	1 - 0 - 1	3	3	0	3
11	Randers FC	2	1 - 0 - 1	5	6	-1	3
12	Vejle	2	1 - 0 - 1	2	5	-3	3
13	FC Nordjylland	2	0 - 0 - 2	2	6	-4	0
14	FC Aarhus	2	0 - 0 - 2	1	5	-4	0
15	Brønshøj	2	0 - 0 - 2	1	5	-4	0
16	B 1913	2	0 - 0 - 2	0	8	-8	0

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers Freja), Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Óli Johannesen (Hvidovre)

Skotska Premier League

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Rangers	1	1 - 0 - 0	4	0	4	3
2	Dundee	1	1 - 0 - 0	3	0	3	3
3	Hearts	1	1 - 0 - 0	2	0	2	3
4	Hibernian	1	1 - 0 - 0	2	1	1	3
5	Livingston	1	0 - 1 - 0	1	1	0	1
6	Partick	1	0 - 1 - 0	1	1	0	1
7	Celtic	1	0 - 1 - 0	0	0	0	1
8	Dunfermline	1	0 - 1 - 0	0	0	0	1
9	Dundee Utd.	1	0 - 0 - 1	1	2	-1	0
10	Aberdeen	1	0 - 0 - 1	0	2	-2	0
11	Motherwell	1	0 - 0 - 1	0	3	-3	0
12	Kilmarnock	1	0 - 0 - 1	0	4	-4	0

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)

Íslendska Landsbankadeildin

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Fylkir	13	8 - 2 - 3	21	10	11	26
2	KR	13	8 - 2 - 3	20	16	4	26
3	ÍBV	13	6 - 1 - 6	19	19	0	19
4	Grindavík	13	6 - 1 - 6	17	20	-3	19
5	FH	13	5 - 3 - 5	21	21	0	18
6	Þróttur	12	6 - 0 - 6	19	19	0	18
7	KA	13	5 - 2 - 6	22	19	3	17
8	ÍA	13	4 - 5 - 4	18	17	1	17
9	Valur	12	4 - 0 - 8	16	22	-6	12
10	Fram	13	3 - 2 - 8	17	27	-10	11

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA)